ADVOKATSKRIVSTOVAN

## TVINGSILS-SØLU

**Týsdagin tann 18. januar 2011, kl. 09.45**, verður á Dómaraskrivstovuni í rættarsali IV, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilsøla av matr. Nr. 366 og 367, Klaksvík.
Ognirnar verða seldar í einum, við tað at talan er um samanbygdar ognir.
Matr. Nr. 367 er bygt á leigugrund í Klaksvíkar kommunum meðan matr. Nr. 366 er ogn.
Onnur helvtin er bygd 1988 av betongelementum. Talan er um stóra søluhøll.
Hin helvtin er bygd í 1957 í 4 hæddum , harav 4. hæddin er loft. Hvør hæddin er 365m2. Bygningurin er stoyptur heilt upp við høgari reising.
Bygningurin hevur alminiumtekju.
Talan er um gamlan bygning, sum krevur ábøtur.
Fyrireikandi tvingsilssølufundur verður týsdagin tann 14. desember 2010, kl. 13:30 í rættarsøli IV, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn.
Sølan er umbiðin av Niels Winther Poulsen, adv, Frúutrøð 4, Tórshavn, Tlf. 35 33 35, E-mail nwp@jura.fo (J.nr.20100184), ið kann geva nærri upplýsingar og útflýggja tvingsilssøluuppstilling, og sum nærri avtalað kan gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Føroya Fútarættur
tann 29/11-2010

Frúutrøð 4 · Postboks 6
FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36
www.jura.fo

**www.sosialurin.fo**

## TVINGSILS-SØLA YVIR MJÓLKA-KVOTU

**Týsdagin tann 14. desember 2010, kl. 9:15** verður á Dómaraskrivstovuni, Rættarsali IV, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir mjólkakvotu á 110.914 litrar.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 203040, www. lawfirm.fo** (sak nr. 5171301), sum kann geva nærri upplýsingar um mjólkakvotuna.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-59/2010).

**Føroya Fútarættur**

ADVOKATSKRIVSTOVAN

## SØLULÝSING

Vegna Byggitøkni (Farhouse) í konkurs, verða hesar ognir seldar til hægstbjóðandi:

EPS blokkar frá MAGU, sum verða nýttir til endurbjálving av húsum EPS byggiblokkar frá MAGU

Bjóðast kann uppá ognirnar samlað ella hvørja sær.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Biritu S. Samuelsen, advokat fulltrúa, bss@jura.fo ella skrivaran Miriam Bjarnadóttir, mib@jura.fo.

Frúutrøð 4 · Postboks 6
FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36
www.jura.fo

# Deildarleiðari til Føroya landsbókasavn

**Við hesum verður starv sum deildarleiðari á Føroya landsbókasavni lýst leyst at søkja til setanar frá 1. januar 2011**

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá deildarleiðaranum er at vera dagligur leiðari á Føroya landsbókasavni, sum er deild undir Søvnum Landsins og m.a. hevur til endamáls:

- at savna, skráseta og varðveita allar føroyskar bókmentir og alt, sum er skrivað av bókmentum um Føroyar og av føroyingum
- at hava handritadeild við handritum o.ø. eftir føroyskar høvundar og handritum, ið annars lýsa føroyska bókmentasøgu, mentan og siðsøgu
- at skipa fyri skráseting av føroysku tjóðbókaskránni
- at umsita tær uppgávur, ið álagdar eru Bókastovuni
- at veita vísindabókasavnstænastu
- at fremja útbreiðslu av kunnleika, vitan og upplýsing í landinum
- at veita granskarum og almenningi ráðgeving og savnstænastur
- at inna gransking í tilknýti til savnindini

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjari hevur bókavarðaútbúgving ella akademiska útbúgving frá lærdum háskúla, ið kann metast at geva fakligan førleika at røkja starvið. Fyrimunur er at hava leiðsluroyndir og kunnleika til bókasavnsarbeiði, og til arbeiði við skráseting og miðlan av bókmentum.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava góð leiðslu- og samstarvsevni, vera ágrýtin, tænastuhugaður, miðvísur, arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Tann, ið verður settur, má góðtaka broytingar í setanar- og starvsviðurskiftum sínum í sambandi við bygnaðarbroytingar.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og samstarvi við onnur søvn og aðrar stovnar og myndugleikar.

**Fleiri upplýsingar**
Umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Andras Mortensen, stjóra á Søvnum Landsins, tel. 215039 ella á andrasm@ fornminni.fo, fyri at fáa meira at vita um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu sendast til:

**Søvn Landsins**
Postrúm 1155
110 Tórshavn, ella til andrasm@fornminni.fo.

Umsóknir skulu vera Søvnum Landsins í hendi í seinasta lagi **13. desember 2010 kl. 15.00.**

---

Søvn Landsins verður sett á stovn 1. januar 2011. Søvn Landsins er ein yvirskipað fyrisiting av søvnunum undir Mentamálaráðnum: Føroya Landsbókasavn, Føroya Landsskjalasavn, Føroya Fornminnissavn, Føroya Náttúrugripasavn og Havlívfrøðiliga Royndarstøðin. Virkisøkið fevnir um náttúru- og mentanarsavnsvirksemi, skjalasavnsvirksemi og bókasavnsvirksemi. Umleið 70 fólk starvast á søvnunum, sum í løtuni húsast á tólv ymiskum støðum.

Landsbókasavnið er tjóðbókasavn føroyinga og hevur sum høvuðsuppgávu at savna inn, skráseta, varðveita og fremja útbreiðslu av kunnleika um føroyskar bókmentir og av bókmentum um Føroyar. Harumframt veitir Landsbókasavnið vísindabókasavnstænastu. Landsbókasavnið skipar fyri skráseting av føroysku tjóðbókaskránni og er føroysk ISBN, ISMN og ISSN- skrivstovva. Á Landsbókasavninum starvast 18 fólk. Sí meira á www.flb.fo.

# Deildarleiðari til Føroya Landsskjalasavn

**Við hesum verður starv sum deildarleiðari á Føroya Landsskjalasavni lýst leyst at søkja til setanar frá 1. januar 2011**

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá deildarleiðaranum er at vera dagligur leiðari á Føroya Landsskjalasavni, sum er deild undir Søvnum Landsins og m.a. hevur til endamáls:

- at tryggja varðveitingina av savnindum (skjølum), ið hava søguligt virði og/ella hava fyrisitingarligan og rættarligan týdning fyri borgarar og myndugleikar
- at gera tað møguligt at vraka savnindi, ið ikki eiga at verða varðveitt
- at ráðgeva myndugleikum í journal- og arkivspurningum
- at umsita arkivavtaluna millum landsstýrið og danska statin
- at hava savnindi tøk hjá myndugleikum og almenningi
- at veita granskarum og almenningi ráðgeving og savnstænastur
- at inna gransking í tilknýti til savnindini

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjari hevur akademiska útbúgving í søgufrøði ella hevur akademiska útbúgving frá lærdum háskúla, ið kann metast at geva fakligan førleika at røkja starvið. Fyrimunur er at hava leiðsluroyndir og kunnleika til savnsarbeiði og at arbeiði við skjølum. Fyrimunur er eisini at hava granskingarroyndir í søguvísindum ella øðrum javnlíkum vísindum.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava góð leiðslu- og samstarvsevni, vera ágrýtin, tænastuhugaður, miðvísur, arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Tann, ið verður settur, má góðtaka broytingar í setanar- og starvsviðurskiftum sínum í sambandi við bygnaðarbroytingar.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og samstarvi við onnur søvn og aðrar stovnar og myndugleikar.

**Fleiri upplýsingar**
Umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Andras Mortensen, stjóra fyri Søvn Landsins, tel. 215039 ella á andrasm@ fornminni.fo, fyri at fáa meira at vita um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu sendast til:

**Søvn Landsins**
Postrúm 1155
110 Tórshavn, ella til andrasm@fornminni.fo

Umsóknir skulu vera Søvnum Landsins í hendi í seinasta lagi **13. desember 2010 kl. 15.00.**

---

Søvn Landsins verður sett á stovn 1. januar 2011. Søvn Landsins er ein yvirskipað fyrisiting av søvnunum undir Mentamálaráðnum: Føroya Landsbókasavn, Føroya Landsskjalasavn, Føroya Fornminnissavn, Føroya Náttúrugripasavn og Havlívfrøðiligu Royndarstøðina. Virkisøkið fevnir um náttúru- og mentanarsavnsvirksemi, skjalasavnsvirksemi og bókasavnsvirksemi. Umleið 70 fólk starvast á søvnunum, sum í løtuni húsast á tólv ymiskum støðum.

Landsskjalasavnið er deild undir Søvnum Landsins. Høvuðsendamálið hjá Landsskjalasavninum er at savna, varðveita, skipa, lýsa og røkja søguligar keldur. Harafturat hevur Landsskjalasavnið til endamáls at vegleiða stovnar, hvussu teir skipa og avhenda savnindi. Á Landsskjalasavninum starvast 6 fólk, umframt 12 verkætlanarsett fólk. Sí meira á www.lss.fo.